# Til foreldur, sum ikki liva saman, og børn teirra

## Um barnaserkøna ráðgeving, mekling, samrøðubólkar og foreldrasamstarvsskeið



Familjufyrisitingin hevur fýra ymisk tilboð til foreldur, sum ikki liva saman, og børn teirra.
Øll foreldur, sum ikki liva saman, og børn teirra, kunnu biðja um barnaserkøna ráðgeving, mekling, og luttøku í foreldrasamstarvsskeiði og samrøðubólki. Tað er ikki eitt krav, at foreldrini hava ella hava havt eitt mál í Familjufyrisitingini, ella at tey hava verið í samband við Familjufyrisitingina áður.
Tað er ókeypis at fáa barnaserkøna ráðgeving og at luttaka í mekling, foreldrasamstarvsskeiði og samrøðubólki.

## Ráðgeving til foreldur

Endamálið við barnaserkønari ráðgeving til foreldur er at hjálpa foreldrunum við avbjóðingum viðvíkjandi tí at hava barn/børn saman, uttan at liva saman.
Ráðgevingin kann fevna um nógv ymiskt, alt eftir hvat ítøkiligu foreldrini hava tørv á.
Tað kann til dømis vera, at tørvur er á

- hjálp til at gera eina ítøkiliga avtalu um eina samveruskipan.
- ráðgeving til at betra um foreldrasamstarvið ella hvussu samskiftið kann betrast.
- ráðgeving um, hvussu foreldrini kunnu hjálpa barninum best og hvat er best fyri barnið í einari ítøkiligari lívs- ella familjustøðu, í sambandi við samveru ella annað.

Dentur verður lagdur á, at ósemjur verða loystar og møguligar avtalur verða gjørdar á ein hátt, sum verður mettur bestur fyri barnið.
Barnaserkøni ráðgevin savnar seg um støðuna hjá barninum, ber fram barnanna sjónarmið og ráðgevur við støði í tí, sum verður mett best fyri barnið.

## Ráðgeving til børn

Børn og ung, hvørs foreldur ikki liva saman, kunnu eisini fáa barnaserkøna ráðgeving.
Í ráðgevingini fær barnið eitt frístað at tosa við ein vaksnan, um sínar tankar, kenslur, trupulleikar og avbjóðingar í sambandi við, at foreldrini ikki liva saman.
Ráðgevin kann hjálpa og stuðla barninum ígjøgnum avbjóðandi tankar og kenslur, og tosað um, hvussu barnið kann handfara tað sum fyllir.

## Mekling

Mekling er eitt tilboð til foreldur, ið eru ósamd um foreldramyndugleika, bústað hjá barni, samveru, barnagjald ella onnur ítøkilig viðurskifti.
Mekling kann bert útinnast, um bæði foreldur luttaka, og bæði mugu hava vilja og evni til at arbeiða fyri at finna felags loysnir.
Tankin handan mekling er, at tað eru foreldrini, ið rúma bestu loysnina til júst teirra ósemju, og eru best til at finna loysnir, sum eru til gagns og best fyri teirra barn/børn.

Mekling fer skipað fram og er býtt í fýra stig – foreldrini greiða frá, uppskot til møguligar loysnir, samráðing um loysnir og at enda ein møgulig avtala. Leikluturin hjá meklaranum er at leiða tilgongdini, og meklarin tekur ikki støðu til ósemjuna og kemur ikki við uppskotum til loysnir.

## Foreldrasamstarvsskeið

Foreldrasamstarvsskeið hevur sum endamál at geva foreldrum kunnleika, íblástur og amboð til at betra teirra samstarv eftir samlívsslit.
Alt skeiðið hevur støði í tí, vit vita, hevur týdning fyri trivnað og tryggleika hjá børnum, hvørs foreldur ikki liva saman. Tá ið foreldur samstarva væl, er tað nakað sum at byggja eina trygga brúgv millum tey tvey heimini hjá barninum.
Skeiðið setur sjóneyku á trý øki:

1. **Foreldrasamstarv** – Hvussu kann samstarv og samskifti um børnini verða styrkt?
2. **Børn** – Hvussu verða børn væl stuðlað undir og eftir samlívsslit?
3. **Egin tilgongd** – Hvussu fáa foreldur tikið sær væl av sær sjálvum undir og eftir samlívsslit?

## Samrøðubólkar til børn

Endamálið við samrøðubólkum er at geva børnum, hvørs foreldur ikki liva saman, høvi at tosa við onnur børn, sum eru í somu støðu og tí kunnu hava upplivað nógv av tí sama.
Børnini fáa møguleika at seta orð á tankar og kenslur viðvíkjandi tí at hava foreldur, sum ikki liva saman, og at hoyra onnur børn greiða frá síni støðu. Børnini verða varug við, at onnur børn hava tað eins og tey, at tey ikki eru einsamøll, og eisini at familjur eru ymiskar.
Ein samrøðubólkur er ein bólkur við 6 - 8 børnum í sama aldri. Børnini hittast ein fastan vikudag aðru hvørja viku í 2 tímar, 7 ferðir tilsamans.
Í hvørjum samrøðubólki eru tvey vaksin, sum leiða bólkin, taka ymisk viðkomandi evni upp og hjálpa børnunum at finna ítøkilig amboð til at handfara tankar, kenslur og av-bjóðingar.
Tað eru børnini, sum tosa saman, meðan bólkaleiðarin er til staðar fyri at seta karmar um prátini, til dømis við spølum og venjingum, og fyri at leiða gongdini og kveikja børnini til virkna luttøku.

Les meira um tilboðini og finn oyðubløð til umbøn um ráðgeving ella mekling og tilmelding til foreldrasamstarvsskeið og samrøðubólk á heimasíðuni hjá Familjufyrisitingini **www.familjufyrisitingin.fo**.

Útgivið: November 2024 · Sniðgivið: KODIO

FAMILJUFYRISITINGIN

Doktara Jakobsens gøta 21 | 100 Tórshavn | +298 20 22 24 | famf@famf.fo | www.famf.fo